# EIN fólkakirkja við frá



*Bispakápan liggur klár: Fráfarandi biskupur Hans J. Joensen vígir tann nýggja, Jógvan Fríðriksson*

## Bispaembætið

**Biskupurin er geistliga háyvirvaldið í stiftinum. Hann hevur eftirlitið við prestunum og kirkjuráðunum í stiftinum. Biskupurin gevur prestunum loyvisbræv (kollats) at virka sum prestar, og eingin kann gerast prestur í fólkakirkjuni uttan loyvisbræv frá biskupi. Hann skal eisini siggja til, at próstar og prestar í tænastu síni halda seg til trúarjáttan evangelisk-luthersku fólkakirkjunnar, og at teir fylgja fyriskipaðu gudstænastuskipan og ritualum fólkakirkjunnar. Kirkjuliga lóggávan letur í ein vissan mun biskupinum upp í hendur at taka avgerðir í ávísum málum. Tað er litið biskupinum til at skipa alla prestatænastuna í stiftinum. Í ávísum førum gevur lóggávan biskupinum myndugleika at geva undantaksloyvi, eitt nú hvat fyriskipanini um konfirmatión viðvíkur. Biskupurin er í ávísum førum eisini kærumyndugleiki; til dømis skulu kærur um kirkjuráðsval fyrst leggjast fyri biskupin. (Kelda: folkakirkjan.fo)**

**Við hátíðarliga gudstænastu í gjár varð Jógvan Fríðriksson vígdur sum nýggi biskupur Føroya. – Eg fari at leggja stóran dent á at samskifta við øll, sum hava við kirkjuna at gera, sigur Jógvan, sum hevur sín fyrsta arbeiðsdag 1. desember**

BISPAVÍGSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Dómkirkjan:** Stórsligið var hátíðarhaldið, tá fyrsti biskupurin í nýggju føroysku kirkjuni varð vígdur seinnapartin í gjár.

Gestir úr Norðurlondum, kirkjuligir myndugleikar, kirkjuráðslimir og onnur vístu nýggja biskupi tann heiður at luttaka við gudstænastuna.

Tey, sum ikki høvdu høvið til hetta, kundu fylgja við gudstænastuni beinleiðis í sjónvarpi og útvarpi, og kundu soleiðis gerast vitni til hesa stórhendingina.

Í dag er mánadagur, og nýggi bispur byrjar so smátt at skifta starv og bústað – frá at hava verið sóknarprestur á Gjaranesi til eina nýggja tilveru sum biskupur Føroya við heimstaði í Havn.

- Eg fari at flyta inn í Bispagarðin millum jóla og nýggjár, sigur Jógvan Fríðriksson við Sosialin.